gult cyan magenta svart



# Sjóbjargingin á dagsskránni

**Løgtingið skal í dag taka støðu til, um MRCC-støðin skal vera føroysk ella vit skulu brúka Marinustøðina til sjóbjargingarmiðstøð eina tíð afturat. Føroyska loysnin er ein panikkloysn, heldur andstøðan.**

SJÓBJARGING
*Magnus Dam*

Samgonga og andstøða eru ikki á einum máli um, hvørt telegrafstøðin skal húsa einari føroyskari sjóbjargingarmiðstøð. Meirilutin í fíggjarnevndini tekur undir við ætlanini hjá landsstýrinum at keypa telegrafstøðina frá Føroya Tele fyri 20 milliónir krónur, meðan andstøðan heldur, at talan er um eina panikkloysn.

Málið kemur til aðru viðgerð í løgtinginum í dag, og tá fæst helst greiða á spurninginum, sum hevur rættiliga stóran skund, nú vit nærkast summarinum og oljufeløgini fara at bora.

Meirilutin í fíggjarnevndini heldur, at tað er ein góð loysn at keypa telegrafstøðina og leggja MRCC-støðina í sama bygningi sum Tórshavn Radio, og at sami bygningur seinni í ár skal húsa Vaktar- og Bjargingartænastuni.

Somu niðurstøðu eru umboðini hjá samgonguni í vinnunevndini komin til, eftir at vinnunevndin hevur ummælt spurningin.

Stovnarnir, sum skulu halda til í telegrafstøðini, hava allir við vaktarhald at gera, og møguleiki skuldi verið fyri at spart uppá starvsfólk, halda samgonguumboðini í vinnunevndini.

Tey mæla tí til, at løgtingið samtykkir uppskotið um eykajáttanarlóg, har biðið verður um 20 milliónir krónur til at keypa telegrafstøðina frá Føroya Tele. MRCC-støðin skal eftir ætlan fáast at virka frá 1. apríl í ár, og meirilutin í fíggjarnevndini heldur tað vera ein fyrimun, at MRCC-støðin kann koma í gongd beinanvegin í hóskandi umhvørvi.

### Panikkloysn

Somu áskoðan hava umboðini hjá andstøðuni í fíggjarnevndini ikki. Tey vísa til viðmerkingarnar hjá minnilutanum í vinnunevndini, har sagt verður, at talan er um eina forhastaða avgerð. Minnilutin heldur í staðin, at MRCC-støðin, sum frammanundan er í Føroyum, kann loysa uppgávuna, og tí er óneyðugt at játta 20 milliónir krónur til at keypa telegrafstøðina fyri nú.

Í dag er MRCC-støðin á Marinustøðini, sum ikki heldur stórvegis trupulleikar standast av at skula umsita støðina eina tíð afturat.

Í vinnunevndini hevur andstøðan eisini sett spurnartekin við ætlanina um at Fiskimálastýrið, skipasýnið, MRCC-støðin, Vaktar- og Bjargingartænastan og Tórshavn Radio skulu halda til í telegrafstøðini.

Minnilutin heldur, at hesin spurningurin eigur at verða kannaður nærri, og inntil tá, skal verandi MRCC-støð halda fram.

Umboðini hjá andstøðuni í fíggjarnevndini mæla tí løgtinginum frá at samtykkja málið.

Tingfundurin í dag byrjar klokkan 13.30, og tá fæst helst at vita, hvørjari loysn tingmenn taka undir við.

# Húsvillur prestur má bíða

**Presturin í Glyvra prestagjaldi má brynja seg við toli, áðrenn hann kann flyta inn í nýggjan prestagarð, sum fylgir við embætinum. Málsøkið er danskt, og danir avgera, um og nær ein prestagarður skal byggjast í nýggja prestagjaldinum**

KIRKJUMÁL
*Magnus Dam*



*Presturin á Glyvrum, Meinhard Bjartalíð, býr til leigu, tí eingin prestagarður er í prestagjaldinum. Men nú er gongd komin á málið, heldur Torbjørn Jacobsen, landsstýrismaður*

Meinhard Bjartalíð, sum er prestur á Glyvrum, býr til leigu. Og soleiðis verður hann helst búgvandi eina tíð afturat, tí enn er eingin verulig loysn fingin á bústaðartrupulleikunum hjá prestinum í nýggjasta prestagjaldinum í landinum.

Danska kirkjumálaráðið tekur sær av bústaðarviðurskiftunum hjá føroysku prestunum. Talan er um danskt málsøki, og enn hevur Kirkjumálaráðið ikki tikið avgerð um at byggja ella keypa prestagarð í Glyvra prestagjaldi.

Og landsstýrið kann ikki fara inn í málið og byggja prestinum prestagarð. Tað sigur Torbjørn Jacobsen, landsstýrismaður í kirkjumálum, í einum svari til Sámal Petur í Grund, løgtingsmann.

Sámal Petur í Grund vildi hava at vita, hvar málið um prestagarð á Glyvrum stendur nú, og um nøkur loysn er at hóma.

Hóast Torbjørn Jacobsen heldur, at málið er føroyskum myndugleikum fullkomiliga óviðkomandi, av tí at talan er um danskt málsøki, so hevur hann kortini roynt at greiða trupulleikan, og nógv samskifti hevur verið millum føroyskar og danskar embætismenn.

### Gongd komin á

Torbjørn Jacobsen hevur millum annað havt fund við danska kirkjumálaráðharran, og hann heldur, at verulig gongd nú er komin á málið. Í løtuni viðgera Føroya Stiftsstjórn og Kirkjumálaráðið spurningin, og Torbjørn Jacobsen roknar við, at greiða er fingin á málinum í næstum. Og hendir tað ikki, so fer landsstýrismaðurin at taka spurningin uppaftur við nýggja kirkjumálaráðharran, Johannes Lebeck.

Landsstýrismaðurin hevur kortini ongar ætlanir um at fara uttanum Kirkjumálaráðið í hesum spurninginum, tí málið liggur ikki undir hansara málsræði.

Hóast fullveldi hevur verið nevnt sum orsøk til íkomnu støðuna, so roknar Torbjørn Jacobsen við, at eitt mál sum hetta eigur at kunna loysast, uttan at spurningurin um fullveldi verður drigin uppí.

– Hetta skuldi helst ligið somikið væl omanfyri dagliga polemikkin um stjórnarrættindi, at tað kann loysast uttan stórveis trupulleikar, sigur Torbjørn Jacobsen í svarinum.

Sambært tíðarætlanini í fullveldisætlanini hjá landsstýrinum, verða føroyskir prestar undir donskum málsræðið eina tíð afturat. Hóast arbeitt hevur verið í nógv ár við at yvirtaka fólkakirkjuna, so verður hetta neyvan eitt av fyrstu málunum, sum verða yvirtikin. Tíðarætlanin hjá landsstýrinum leggur upp til, at fólkakirkjan skal verða yvirtikin í seinasta lagi 1. januar í 2006.

# Framtaksgrunnur skal hjálpa útjaðaranum

**Javnaðarflokkurin skjýtur upp at stovna ein grunn við 25 milliónum, sum skulu brúkast til at fáa gongd á vinnuligar verkætlanir í útjaðaranum.**

ÚTJAÐARAGRUNNUR
*Magnus Dam*

Føroyingar eiga at fylgja íslendingum, sum hava ein grunn, sum burturav tekur sær av at veita vinnuligum verkætlanum í útjaðaranum fígging. Tað heldur Javnaðarflokkurin, sum fríggjadagin legði fram eitt uppskot um at stovna ein útjaðaragrunn við almennum milliónum.

Gongdin í útjaðaranum er so skeiv, at politikkararnir mugu gera okkurt fyri at fáa vent henni, heldur Jóannes Eidesgaard, sum legði uppskotið fram. Hann vísir á, at tað er komið fram fleiri ferðir, at fíggingarstovnarnir eru trekir at fíggja vinnulívsætlanir í útjaðaranum. Vandin fyri, at verkætlanin ikki ber seg, verður ofta mettur at vera størri í útjaðaranum enn í miðstaðarøkinum, sum hevur fingið nógv tann størsta ágóðan av stóru framgongdini seinastu árini.

Jóannes Eidesgaard vísir á, at vinnuliga menningin er fyrsta treyt fyri trivnaði í útjaðaranum. Og tá tað er so trupult at fáa gongd á nýggjar verkætlanir, so er ringt at fáa nakra menning í lag.

– Útjaðaratrupulleikarnir eru ein politiskur trupulleiki, um vit vilja tað ella ei. Vilja vit politikarar, at tað skal verða liviligari í útjaðaranum soleiðis, at føroyingar eisini búsetast uttan fyri miðstaðarøkið, so mugu vit eisini medvirka til at fremja politisk tiltøk, sum muna fyri útjaðaran, sigur Jóannes Eidesgard.

Ein gongd leið er at stovna ein útjaðaragrunn, sum kann koma við neyðugu ískoytisfíggingini, sum peningastovnarnir ofta krevja av verkætlanum í útjaðaranum. Á henda hátt verður tað lættari at sannføra peningastovnarnir um at veita útjaðaraverkætlanum lán og fígging.

Útjaðaragrunnurin kann koma við neyðuga váðafúsa peninginum, annaðhvørt við at seta partapening í vinnuligar verkætlanir ella við láni.

Javnaðarflokkurin skjýtur upp, at landsstýrið ger uppskot uppskot um ein útjaðaragrunn, og síðani kemur niðan aftur í løgtingið við uppskotinum. Ein hóskandi upphædd at seta í ein tílíkan grunn er 25 milliónir krónur, heldur Javnaðarflokkurin.

Løgtingið fer í dag at viðgera uppskotið til samtyktar um útjaðaragrunnin.



*Vøra verður skipað upp á lendingini á Kirkju. Javnaðarflokkurin skjýtur nú upp at stovna ein útjaðaragrunn, sum skal seta váðafúsan pening í verkætlanir í útjaðaranum*

gult cyan magenta svart



# Fáa 2 milliónir til fólkaatkvøðuna



*Høgni Hoydal, landsstýrismaður, skjýtur upp, at játtaðar verða tvær milliónir krónur í trimum puljum til politiska upplýsing undan fólkaatkvøðuni 26. mai*

**Tvær milliónir skulu játtast politiskum flokkum, felagsskapum og einstaklingum til upplýsing undan fólkaatkvøðuni. Landsstýrið hevur sent andstøðuflokkunum lógaruppskot um hetta til ummælis**

FÓLKAATKVØÐAN
*John Johannessen*

Samlaða játtanin til upplýsing undan fólkaatkvøðuni 26. mai verður 2 milliónir krónur.

Hetta skjýtur Høgni Hoydal, landsstýrismaður, upp í lógaruppskoti, sum hann hevur sent til landsstýrisfund og andstøðuflokkunum til ummælis, áðrenn tað seinni í vikuni ella tíðliga í næstu viku verður borið í tingið.

Lógaruppskotið er sostatt enn ikki alment, orsakað av, at tað ikki er liðugt viðgjørt í landsstýrinum.

### Tríggjar puljur

Hóast talan er um at játta tvær milliónir at upplýsa fyri undan fólkaatkvøðuni, er ætlanin kortini, at politisku flokkarnir bert skulu fáa eina millión at býta ímillum sín eftir atkvøðutalinum á løgtingsvalinum í 1998.

Hin milliónin skal játtast felagsskapum, fylkingum og einstaklingum, sum hava til endamáls at virka í sambandi við fólkaatkvøðuna, og sum ikki eru at meta sum partur av verandi politisku flokkum á løgtingi.

Hendan milliónin verður býtt í tveir partar, soleiðis at felagsskapir og fylkingar fáa 600 túsund krónur at býta ímillum sín, meðan einstaklingar kunnu fáa burtur av eini pulju, sum er 400 túsund krónur.

Sostatt er játtanin í trimum puljum. Ein millión til flokkarnar á tingi, 600 túsund til felagsskapir og fylkingar og at enda 400 túsund til einstaklingar.

### 100 limir

Ávísar treytir verða settar, fyri at felagsskapir kunnu fáa burtur av játtanini.

Fyrst og fremst skal felagsskapurin hava viðtøkur við endamálsorðingum, ið beinleiðis viðvíkja fólkaatkvøðuni. Harafturat skal felagsskapurin kunna prógva, at hann í minsta lagi hevur 100 limir. Hetta skal hann gera við at senda inn limalista saman við umsókníni um stuðul. Á limalistanum skulu limirnir greitt vera lýstir við navni, undirskrift, starvi og bústaði. Ert tú ikki á limalistanum, ber kortini til at senda inn váttan um, at tú hevur teknað teg sum lim, við fjarriti, brævi ella faxi, men ikki við telduposti.

Lógaruppskotið hjá Høgna Hoydal heimilar tær ikki at vera limur í fleiri felagsskapum, sum virka í sambandi við fólkaatkvøðuna og fáa játtan. Í uppskotinum er greitt tilskilað, at limur í fleiri feløgum, sum søkja stuðul, telur í lógarinnar høpi einans við sum limur í tí felag, sum fyrst letur inn limalista, har hann er nevndur. Koma fleiri limalistar við sama persóni inn samstundis, telur hesin ikki við sum limur í nøkrum av felagsskapunum.

Tær 400 túsund krónurnar, sum verða latnar einstaklingum, eru ætlaðar til teirra, sum ætla sær at skipa fyri serligum upplýsandi tiltøkum í sambandi við fólkaatkvøðuna. Til dømis fólkum, ið ætla at skipa fyri kjakkvøldum, fyrilestrum ella líknandi.

### Óheft nevnd

Fyri at fáa játtanarmyndugleikan so langt burtur frá politiska myndugleikanum sum gjørligt, skjýtur Høgni Hoydal upp, at ein óheft nevnd mannað av løgfrøðingum, skal gera av, hvør kann fáa pening.

Høgni Hoydal skjýtur upp, at løgmaður velur eina nevnd við trimum fólkum við løgfrøðisligum embætisprógvum, og sum ikki starvast hjá løgtinginum, dómsvaldinum ella í fyrisiting landsstýrissins at vera játtanarmyndugleiki.

Nevndin skal taka avgerðir sambært vanligum meiriluta, og eru avgerðirnar endaligar.




*Flokkarnir á tingi fáa eina millión at býta ímillum sín eftir atkvøðutalinum við valið í 1998*




*600 túsund krónur verða játtaðar felagsskapum og fylkingum, sum beinleiðis hava til endamáls at virka til fólkaatkvøðuna. Fyri at fáa pening, skal talið av limum í minsta lagi vera 100*




*400 túsund krónur verða játtaðar einstaklingum, sum ætla sær at skipa fyri serligum upplýsandi tiltøkum upp undir fólkaatkvøðuna*

*Grafikkur: Álvur Haraldsen*

## Játtanin tryggjar fólkaræðið



**At játta pening til upplýsing undan fólkaatkvøðuni tryggjar, at avgerðin verður tikin á fullgóðum fólkaræðisligum grundarlag, heldur Høgni Hoydal, landsstýrismaður**

FÓLKAATKVØÐAN
*John Johannessen*

»Landsstýrið metir, at tað er umráðandi, at fólka fáa høvi at kunna onnur um áskoðan sína, ella fáa ávirkan á, hvørjir serligir møguleikar ella vandamál verða lýst í sambandi við fólkaatkvøðuna. Soleiðis verður tryggjað, at avgerðin verður tikin á fullgóðum fólkaræðisligum grundarlag.«

Hetta sigur Høgni Hoydal, landsstýrismaður, millum annað í viðmerkingum sínum til uppskotið um fíggjarligan stuðul til politiska upplýsing undan fólkaatkvøðuni í mai.

Høgni Hoydal sigur, at talan er um eina so týdningarmikla avgerð í Føroya søgu, at landsstýrið metir, at málið má viðgerast út í æsir, bæði í politisku skipanini og manna millum. Tí skjýtur hann upp, at løgtingið játtar 2 milliónir krónur til upplýsing undan fólkaatkvøðuni. Hetta skal gerast við eykajáttanarlóg.

Sambært uppskotinum hjá Høgna Hoydal skal 1 millión játtast politiskum flokkum, 600 túsund skulu játtast felagsskapum og fylkingum og 400 túsund skulu játtast einstaklingum.

Í hesum sambandi vísir Høgni Hoydal á, at hetta ikki er nakað, sum er ókent í londunum kring okkum. Millum annað nevnir hann, at í Danmark játtar Fólkatingið hvørt ár politisku flokkunum og stóru fylkingunum stuðul til upplýsing í sambandi við ES, eing og peningur eisini verður settur av til einstøk tiltøk, ið onnur enn hesi skipa fyri.